## Gomul klæðir geva yvirskot

Í 2006 eydnaðist tað endurnýtslubúðunum hjá Neyðhjálp Fólkakirkjunnar at fáa 15,6 milliónir krónur í yvirskot. Endurnýtslubúðin í Føroyum gav íkast á 100.000 krónur, sum Pipar og Salt gav teimum. Hetta er fjórða árið á rað, at tað eydnast teimum sjálvbodnu í teimum 118 endurnýtslubúðunum hjá Neyðhjálp Fólkakirkjunnar at fáa yvirskot. Í tíðindaskrivi verður sagt, at høvuðsorsøkin til tað góða úrslitið, eru tey umleið 3.700 sjálvbodnu, sum hvørja viku brúka nakrar tímar upp á hetta arbeiði. Ein onnur orsøk er, at fimm nýggjar endurnýtslubúðir sóu dagsins ljós í fjør – ein teirra í Niels Wintersgøtu 9 í Havn.

## Vaksandi harðskapur móti lærarum

Fjórði hvør lærari í Danmark hevur verið úti fyri ógvusligum hendingum, við annaðhvørt harðskapi ella hóttanum sum parti av tí. Tað skrivar Politiken, sum endurgevur Undervisere.dk fyri hesi tíðindi. Víst verður til kanning, har 24% av lærarunum siga seg hava verið úti fyri harðskapi ella hóttanum innan fyri seinasta árið. Heili 10% av lærarunum siga seg hava upplivað hetta seks ferðir seinasta árið. Í 1994 gjørdi Center for Alternativ Samfundsanalyse eina líknandi kanning, og tá søgdu einans 10% siga hava upplivað harðskap ella hóttanir.

# Óneyðugt við dramatiskum tiltøkum

**-Vit hava roynt veiðibann fyrr, og tað vilja vit ikki hava aftur, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum.**



*Jákup Sólstein ivast ikki í, at toskurin kemur aftur, og tí eru dramatisk tiltøk óneyðug.*

ICES-TILMÆLIÐ

*Árni Joensen: arni@sosialurin.fo*

Jákup Sólstein hevur ikki gloymt tað, sum spurdist burturúr, tá ICES mælti føroyingum til at gevast at veiða tosk fyrst í nítiárunum. Tað endaði við einari kvotu, men avleiðingarnar vóru umfatandi.

- Tað, sum hendi tá, vilja vit ikki hava aftur. Tann hurlivasan vit at býta vilja vit ikki hava eina ferð afturat, sigur formaðurin í Reiðarafelagnum, nú ICES mælir til at steðga allari beinleiðis roynd eftir toski á landgrunninum.

ICES sigur, at toskurin undir Føroyum er stak illa fyri, og Jákup Sólstein ásannar, at tað er lítil toskur til. Hinvegin er rættiliga fitt av heilt smáum toski, sum ætlandi kemur inn í fiskiskapin seinni í ár og næsta ár, og formaðurin í Reiðarafelagnum er sannførdur um, at tað er ikki neyðugt við dramatiskum tiltøkum.

- Vit eiga at halda fram við verandi skipan, tí toskurin kemur aftur. Trupulleikin er, at Fiskirannsóknarstovan og ICES góðkenna ikki fiskidagaskipanina, og at hon regulerar viðurskiftini sjálv.

Jákup Sólstein hevur annars ilt við at fáa eyga á, hvat eitt bann ímóti beinleiðis toskaveiði merkir, tí við fiskidagaskipanini hava vit onga beinleiðis vinnuliga toskaveiði. Tað einasta, sum kann koma undir hetta, er snelluveiðan á Norðhavinum, og har er ikki talan um tær stóru nøgdirnar.

Toskurin er heldur ikki stórur partur av veiðuni hjá skipunum. Hjá línuskipunum liggur hann um 20 prosent og hjá partrolarunum er hann munandi minni partur.

# – Hatta hevði eg væntað

**Tilmælið frá ICES kemur ikki óvart á formannin í Løgtingsins vinnunevnd**



*Henrik Old: -Vit eiga í hvussu er at steingja Føroya Banka næsta fiskiár.*



ICES-TILMÆLIÐ

*Árni Joensen: arni@sosialurin.fo*

- Tað ljóðar líka illa allastaðni, so eg hevði væntað mær ein dapran boðskap um toskin. Tí kemur tilmælið frá ICES ikki óvart á meg, sigur Henrik Old.

Sum formaður í Løgtingsins vinnunevnd skal hann standa fyri teirri politisku viðgerðini, tí sjálvur er hann ikki í iva um, at støðan skal takast í størsta álvara. Eitt veiðibann kemur ikki upp á tal, tí so skal so nógv annað gerast, men formaðurin í vinnunevndini hevur longu gjørt sær sínar tankar um, hvat kann gerast.

- Eg fari í hvussu er at skjóta upp, at Føroya Banki verður stongdur næsta fiskiár, og harafturat eiga vit at umhugsa at steingja ávísar leiðir, sum eru uppvakstrarøki hjá toski, sigur Henrik Old.

Sjálvur mælti hann longu í fjør til at steingja Føroya Banka, men fekk ikki politiska undirtøku fyri tí, og hann væntar ikki, at tað verður nakað lættari hesaferð.

- Hetta verður eitt strævið politiskt talv, sigur Henrik Old.